## DAGSINS MEINING

# Floksskifti og sterk uppstilling

Tað er lítið at ivast í, at Helena Dam á Neystabø fer at styrkja listan hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymoy. Javnaðarfólk hava heitt á hana at stilla upp, og hon verður tí, sambært tí, sum er komið fram, helst skotin upp til valevnislistan á uppstillingarfundi í næstu viku. Ein sterkur listi elvir til økta kapping millum valevnini. Við henni á listanum, saman við m.a. Katrin Dahl Jacobsen og Kristiani Magnussen oø., verður kapping millum fleiri valevni, og tað dregur fleiri atkvøður til lista og flokk.

Frammanundan vita vit, at Tjóðveldisflokkurin hevur stillað "sterkt" upp, og á tí listanum fara óivað 4-5 valevni at kappast um annað og triðja pláss. Hjá tí størsta og kanska næststørsta flokkinum í valdøminum er kapping eisini um triðja plássið. Tað gevur kanska ikki ein umdømisvaldan tingmann ella -kvinnu, men tað kann geva eitt eykavalt umboð á tingi, um avlopsakvøðurnar annars falla til valdømið.

Sambandsflokkurin í Suðurstreymoy skuldi hava síðsta uppstillingarfundin hóskvøldið, men listin er ikki kunngjørdur. Men umframt Listbeth Petersen og Heðin Mortensen eru Høgni Mikkelsen, býráðslimur, og Kaj Leo Johannesen, fyrrverandi býráðslimur, á listanum. Báðir hava fingið nógvar atkvøður á býráðsvalum.

Fólkaflokkurin stillar eisini upp við fólkum, sum áður hava fingið nógvar atkvøður. Umframt Óla Breckman og Bjarna Djurholm eru Bjarti Mohr, býráðslimur, og Poul Michelsen, fyrrverandi býráðsformaður, í uppskoti. Hetta merkir ein sterkan lista, sum kann fáa nógvar atkvøður frá miðjuni og frá høgraveingi.

Tað er tí umráðandi, at Javnaðarflokkurin, sum er fremsti flokkur at umboða ta samhaldsføstu hugsjónina, stillar upp ein so sterkan lista sum gjørligt ímóti teimum meiri borgarligt sinnaðu flokkunum.

Tað sigur seg sjálvt, at summi seta spurnartekin við trúvirðið, tá politikkarar skifta flokk. Hinvegin hava politikkarar eins og øll onnur tann demokratiska rættin at flyta áskoðan. Í hesum føri hevur Helena Dam á Neystabø hildið seg kunna tikið undir við teimum politisku stevnumiðunum hjá Javnaðarflokkinum, og tað má vera tað, sum telir. Men tað krevur so eisini, at hon fer at vísa hetta bæði í orðum og verki.

Skal ein javnaðarpolitikkur fremjast í verki er neyðugt við einum flokki við sterkari umboðan á løgtingi eins og í kommunum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skeivt at taka ónøgd fólk úr øðrum flokkum upp á listan

**Ása Olsen**
*forkvinna í Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag*



Ikki kann sigast, at hettar kom óvart á meg.

Sum gongdin hevur verið hettar seinasta árið, so kann ikki sigast annað enn, at eg havi bert bíðað eftir, hvat næsta stigið hjá Helenu Dam á Neystabø fór at verða.

At tað júst er Javnaðarflokkurin, eftir at hon seinasta vár misti høvdið sum landsstýriskvinna, orsakað av næstan beinleiðis forfylging frá tingumboðum Javnaðarfloksins, sigur ikki so lítið um, hvussu ein kann selja seg sjálvan. Tað skerst ikki burtur, at tann mátin, hon hevur ført seg fram, serliga eftir at hon trekti seg sum formansvalevni í november í fjør, so skuldi ein næstan trúð, at hon heldur seg verða eitt slag av "martyr" og hava ikki so fá sjálvstýrisfólk hoppa uppá hennara sjónleikarevnir.

Eg sum eitt av umboðunum fyri Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag, og sum alla tíðina havi verið sera tætt uppá tað, ið er farið fram, kann ikki annað enn undrast yvir, at fólk, ið hava hoyrt til flokkin næstan alt sítt lív, ikki hava fingið eyguni upp fyri hesum sjónleiki.

At Sjálvstýrisflokkurin fekk nýggjan bygna var einans tí, at hon kom til mín, og bað meg saman við lokalfelagnum í Suðurstreym gera uppskot til nýggjan bygna, har flokkurin fekk ein formann, á sama hátt sum eitt nú Javnaðarflokkurin, og at hesin formaður eisini skuldi gerast løgmansevni floksins.

Tá vit høvdu gjørt uppskot til bygnaðarbroytingar, varð uppskotið lagt fram á landsfundi í Eysturoy, har tað varð beint í nevnd, og í desember í 2000 varð uppskotið endaliga samtykt á landsfundi í Havn.

Tá spurningurin um, hvussu ofta formansval skuldi verða, var til viðgerðar, var størsta undirtøkan fyri, at formansval skuldi verða á hvørjum ári. Grundgevingarnar frá teimum ymisku valdømunum var, at tað vildi gera landsfundin meiri áhugaðan.

Nú Sámal Petur í Grund bjóðaði Helenu av aftur til formansvalið seinasta heyst, so kann ikki loynast, at orsøkin til, at hon trekti seg var, at hon visti, at hon fór ikki at vinna formans valið, tí at hon kundi bert fáa váttan frá Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag um stuðul til formansvalið.

At landsnevndarumboð fyri hini valdømini síðani fóru út í panikk, fyri at royna at bjarga henni sum formanni, tað skal eg ikki koma inn á hesu ferð. Floksleiðslan í Sjálvstýrisflokkinum fór enntá so langt, at Helenu stóð í boði at gerast framsøgufólk floksins, men svaraði hon aftur við at siga seg úr flokkinum.

Tá Helena ringdi til mín og boðaði frá, at hon fór úr flokkinum, so spurdi eg sjálvandi um orsøkina, og segði hon mær, at tað var tí, at hon kundi bert fáa boðið tað næstbesta frá flokkinum, og at tað var ikki gott nokk.

Tá Helena førir seg fram sum »martyr«, so kundi eg hugsað mær at vita, um hon heldur, at vit sum hava verið vitnir til alt tað, ið er farið fram, framhaldandi skulu tiga og lata hana boltra sær í støðuni, hon sjálv hevur ført seg út í.

Tað skerst ikki burtur, at hon er fallin fyri egnum uppskoti, og tá hon fór úr Sjálvstýrisflokkinum, tí at henni bert stóð tað næst besta í boði, so man Javnaðarflokkurin hava boðið henni tað besta.

At enda ein heilsa til øll tey mongu, ið halda at Sjálvstýrisflokkurin er liðugur sum flokkur: Ikki trúgvi eg, at øll tey mongu sjálvstýrisfólk, ið øll hesi ár hava stuðlað flokkin fyri hugsjónina, flokkurin stendur fyri, fara at venda flokkinum bakið av hesum, ið er farið fram. Vit skulu minnast til, at flokkurin er ikki stovnaður av ónøgdum limum úr øðrum flokkum, men kann hettar, ið er hent í okkara flokki ikki annað enn verða til ávaring um, hvussu vandmikið tað er at taka ein og hvønn uppá listan, serliga teir ónøgdu limirnar aðra staðni frá.

Sosialurin
Sosialurin i

## Skeivt navn

Á blaðsíðu 11 í blaðnum í gjár prentaðu við grein, nevnd »Sjálvberandi bú-skapur«. Av misgávum kom skeivt navn at standa við greinina. Rætta navnið er Heri Mohr, og biða vit høvund og lesarar umbera mistakið.

**blaðstj.**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Ein dýr samgonga

**Atli Hansen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin í Eysturoy*



Tað tykist sum samgongan er ógvuliga ósamd um avrikini í hesum valskeiðnum.

Í Dimmalætting 30.01.02 letur Sámal P. í Grund, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, okkum vita, at almannaøkið er eftirbátur og at tørvurin á røktar- og búplássum er hin sami nu sum tá íð henda samgongan tók við leiðsluni fyri úti við fýra árum síðan, tí hann hevur ongar íløgur gjørt í hesum tíðarskeiði.

Hetta er ikki rætt, sigur ein av samgongufeløgunum hjá honum undir orðaskiftinum í Løgtinginum um privatisering. Tá íð ein av tingmonnunum segði nøkulunda tað sama sum Sámal P. í Grund, svaraði Anita á Fríðriksmørk honum aftur, at hetta passaði ikki, tí í hesum valskeiði hevði samgongan brúkt 400 mió. kr. á almanna- og heilsuøkinum og 200 mió. kr. á skúlaøkinum.

Men helst hava tey bæðið rætt, so merkiligt tað kann ljóða.

Tá íð vit í politiska orðaskiftinum hava hava víst á, at samgongan millum lítið og einki hevur fingið á skafti á teimum ymisku økjunum, hevur svarið ofta verið: Passar ikki, vit hava brúkt so og so nógvar milliónir krónur. Sum um tað var eitt prógv í sjálvum sær at hava brúkt nógvar milliónir!

Og júst tí kann eisini vera eitt ávíst samsvar millum hesar báðar útsagnir. Niðurstøðan verður tá, at Sámal P. í Grund og aðrir landsstýrismenn lítið og einki hava fingið fyri milliónirnar hjá Anitu á Fríðriksmørk.

Og hetta samsvarar væl við vanligu myndina av samgonguni fyri alt valskeiði. Nógvar milliónir brúktar á eini bólgnandi fíggjarlóg, men lítið sæðst aftur. Alt okkara vælferðarøki liggur í sama vánaliga standi sum tá í samgongan tók við.

Sambandsflokkurin hevur ferð eftir ferð víst á henda trupulleika, men hevur ikki fingið undirtøku frá hinum flokkunum til at gera nakað munagott.

Samgongan hevur gjørt eina fíggjarlóg, sum longu við ársbyrjan hevur hall. Oman á hetta hallið fer at koma útreiðslurnar til øll tey gyltu vallyftini, sum sama samgonga er farin undir at lova. Og tað er bert eitt stað at fara eftir pengunum og tað er hjá borgarunum.

Men arbeiðið, sum samgongan ikki hevur gjørt skal gerast – og fíggjast. Tí verður neyðugt at hugsa aðrar vegir tá íð pensiónir, røktarheim, skúlar, sjúkrahús o.s.fr.v. skulu hava ábøtur ella gerast av nýggjum. Peningur kann sum kunnugt bert nýtast einaferð og hesaferð hevur samgongan brúkt allar og meira afturat uttan at fáa nakað afturfyri.

Men fyri at hugsa nýtt, má nýtt fólk til ogt tá íð á hevur staðið fyrr og óskil hevur verið á, hevur tað ofta verið ein góð loysn at lata Sambandsflokkinum ta politisku leiðsluna og soleiðis man eisini vera hesaferð. Sambandsflokkurin kann venda gongdini – bæðið frá fíggjarligari vanstýring og fullveldi.

# Javnaðarflokkurin tekur undir við løgmanni

**Føroya Javnaðarflokkur**

Í sambandi við, at løgmaður hevur steðgað stovnsetingini av einum løgmálaráði í miðfyrsitingini, skal Javnaðarflokkurin gera vart við, at flokkurin tekur undir við avgerðini.

Javnaðarflokkurin hevur annars mælt til, at sett verður á stovn eitt innanlandssstýri, ið kann umsita eitt nú kommunumál, umhvørvismál, útjaðaramál, útoyggjamál og rættar- og lógarmál.

Men Javnaðarflokkurin er samdur við løgmanni í, at eitt slíkt stórmál eigur at bíða til eftir valið. Hetta er ein røtt og demokratisk avgerð, ið tænir løgmanni til æru. Tað er vanlig demokratisk siðvenja í øllum fólkaræðiligum londum, at stórar politiskar avgerðir ikki verða tiknar beint undan einum vali, hóast valið sjálvt enn ikki er skrivað út. Tað er júst hetta, løgmaður tykist at hava viðurkent við sínari avgerð um at steðga skipanini av einum løgmálaráði í Tinganesi her og nú - 12 vikur fyri, at valið í seinasta lagi skal verða hildið.

Avgerð løgmans er ein viðurkenning av, at landsstýrið í roynd og veru nú bert eigur at virka sum eitt umsitingarstýri.

Tískil eisini ein áheitan á løgmann, um at hann eigur at steðga størri og smærri politiskum avgerðum, sum breið politisk semja ikki er um.

# Arbeiðið at stovna eitt føroyskt Løgmálaráð heldur fram

**Høgni Hoydal**
*Landsstýrismaður*



Eg undrist á at frætta í fjølmiðlunum, at løgmaður sigur seg hava støðgað arbeiðinum at stovnseta eitt føroyskt løgmálaráð.

Tað, sum er hent í málinum, er, at løgmaður í heyst boðaði øllum landsstýrinum og starvsfólkunum frá, at hann fór at seta á stovn eitt føroyskt løgmálaráð. Síðani hevur hann broytt støðu og sagt, at hann vil ikki seta hetta formliga í verk enn.

Sum eg havi skilt tað, so eru tað partapolitisk atlit og mótstøða í fólkaflokkinum, sum hava fingið hann at broyta støðu. Slíkt kann henda upp undir val.

Men hóast hendan formliga trupulleika, so heldur arbeiðið við at stovnseta eitt føroyskt løgmálaráð fram – og tað er í fullum forstáilsi millum løgmann og undirritaða.

Í sambandi við at Løgregla, dómsvald, persóns-, familju- og arvarættur og útlendingamál, koma á føroyskar hendur, eru bæði fólk sett við, og vit gera útbúgvingarskipanir innanhýsis til tess at umsita hesi mál á fullgóðan hátt.

Hetta eru jú tey mest týdningarmiklu málini fyri eitt føroyskt fullveldi. Í einum stati er týdningarmikið at hava eina javnvág millum lóggevandi, útinnandi og dømandi vald. Vit hava í Føroyum havt ávíst útinnandi og lóggevandi vald, meðan dømandi valdið hevur ligið í Danmark.

Tað er eftir mínum tykki ein høvuðsorsøkin til, at so nógv ógreið lóggáva hevur verið, at ábyrgdin hevur verið ógreið - og ov lítið hevur verið gjørt við rættartrygd og samsvar millum lóggávu, umsiting, eftirlit og avleiðingar.

Eitt tað besta dømi um avleiðingarnar av hesum, eru skipamálini, har ongin ábyrgd og avleiðing varð staðfest.

Tað føroyska løgmálaráðið fer at ganga á odda fyri at samskipa gott føroyskt lógarsmíð, fullgóða umsiting, alment innlit og rættartrygd.

Vit arbeiða í løtuni av øllum alvi í samráðingum við danir at fáa bygt upp vitan, førleika og skipanir til tað føroyska løgmálaráðið.

Tað er mín ábyrgd sum landsstýrismaður at umsita hetta á fullgóðan hátt. Tað geri eg við at skipa arbeiðið við greiðari ábyrgd og greiðum uppgávubýti – og tí arbeiða vit í veruleikanum sum eitt føroyskt løgmálaráð í sjálvstýrisumsitingini og á lógardeildini.

# Neyðugt at sameina vælferðarpolitikkin og sjálvstýrispolitikkin



**Helena Dam á Neystabø**
*løgtingskvinna*

Eftir áheitan frá javnaðarfólkum og eftir drúgva umhugsan havi eg játtað at vera í uppskoti sum valevni til løgtingsvalið hjá Javnaðarflokkinum her í Suðurstreymi. Og eg havi meldað meg inn í javnaðarflokkin.

Tað eru serliga tvinnanda viðurskifti, sum hava havt mín áhuga, tey árini, ið eg havi sitið í løgtinginum og í landsstýrinum: sjálvstýrismálið og vælferð Føroya fólks.

**Sjálvstýrismálið**
Um sjálvstýrismálið er at siga, at verandi samgonga, ið eg eisini havi verið partur av, ikki megnaði at skipa eina sjálvstýristilgongd, sum fekk breiða undirtøku í løgtinginum og - ikki minst - í fólkinum. Eg royndu mangar ferðir at fáa løgmann at bera so í bandi, at javnaðarflokkurin eisini kundi vera við í eini loysn av sjálvstýrismálinum, men hetta var til fánýtis. Tvær fólkaatkvøður vóru eisini eitt krav, men eisini tað miseydnaðist. Ein sjálvstýrispolitikkur, sum ikki hevur rímiliga stóra undirtøku hjá Føroya fólki, er frammanundan dømdur til at miseydnast.

**Vælferðin**
Hitt málið er vælferðin. Har havi eg sum landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum - og eisini eftir at eg fór úr samgonguni til dømis roynt at tryggja pensjonistum betri sømdir.

Í mínum politiska virksemi havi eg altíð roynt at sameint sjálvstýrispolitikkin og vælferðarpolitikkin, so at føroyingar kenna seg tryggar við sjálvstýristilgongdina.

**Sjálvstýrislógin**
Javnaðarflokkurin er komin við sínum uppskoti um sjálvstýrislóg, sum eg eisini kann taka undir við. Tað positiva við hesum uppskotinum er, sum Javnaðarflokkurin sjálvur sigur, at hetta ikki er eitt ultimatum frá Javnaðarflokkinum, men eitt útgangsstøði at arbeiða víðari á. Ásannandi, at skal ein nýggja skipan fáa nóg stóra undirtøku, noyðast allir flokkar at lora nakað, summir meira summir minni. Tí haldi eg heldur ikki, at tað er skilagott, nú eitt løgtingsval stendur fyri durum, at koma við útsøgnum, sum aftur fara at læsa støðuna fasta.

**Breið semja er neyðug**
Politikkurin komandi valskeið má hava sum aðalmál at sameina sjálvstýrispolitikkin og vælferðarpolitkkin. Vit mugu fáa sjálvstýrispolitikkin í eina trygga og hóvliga legu við breiðari undirtøku. Vit kunnu heldur ikki steðga sjálvstýristilgongdini. Tað hevur einans frustratiónir við sær, og so enda vit aftur í somu rembingum, sum hava verið hetta seinasta valskeiðið, og ikki minst í valskeiðnum frammanundan.

Fáa vit í breiðari semju langt lunnar undir ein rímiligan sjálvstýrispolitikk, kann tann politiska orkan meira enn higartil verða brúkt til tær veldugu avbjóðingar, sum standa fyri framman hjá teirri føroysku tjóðini: Pensjónirnar, røktarheimspláss, íbúðartørvurin, sjúkrahúsverkið, oljuvinnan osfr.